Til Friðingarnevndina í Eysturoy

Tórshavn 23/11-2007

## *Viðvíkjandi umsøkn frá Eiðis kommunu*

Fuglafrøðifelagið er ørkymla av gongdini í hesum máli, sum í grundini er einfalt. Hetta skrivið er tí í tveimum. Fyrst eru nakrar viðmerkingar til sjálva gongdina í málinum, og síðan tær viðmerkingar sum vit hava í samband við, at Friðingarnevndin í Eysturoyar sýslu nú viðgerð umsøkn frá Eiðis kommunu.

## Gongdin í málinum

31. juli í ár sendi Fuglafrøðifelagið eitt skriv til Friðingarnevndina. Her vóru tvey punkt nevnd: økið har barnagarðurin nú stendur í gerð og økið har ætlan er um at gera eitt stadion.
Fyrra punktið hevur eftir øllum at døma als onga viðgerð fingið. Í hvussu er kennir Fuglafrøðifelagið einki til tað.
Seinna punktið fekk als ikki nóg góða viðgerð. Tí hóast Friðingarnevndin (Sýslumaðurin) ætlaði at steðga Eiðis kommunu, so skjótt hon fór í holt við hesa ætlan - at grava omanav - so tók tað alt ov langa tíð, frá tí at arbeiði byrjaði til tað varð steðgað. Sýlsumaðurin var í feriu tá ætlanin var sett í verk, og næsti maður á staðnum, helt ikki at arbeiðið átti at verða steðgað. Ikki fyrr enn Sýslumaðurin, fleiri dagar seinni, var tøkur varð arbeiðið steðgað. Tá var longu nógv grivið omanav.

Støðan sum Fuglafrøðifelagið sær hana, er tann, at eitt punkt í fyrru áheitanini als ikki hevur verið viðgjørt og at seinna punktið var illa viðgjørt.

Tá áheitanin frá Eiðis kommunu, sum nú fyriliggur, tykist verða tað einasta sum verður viðgjørt, so sær tað út til at §25 í lógini, sum Friðingarnevndin virkar eftir, verður lopin um. Tað er neyvan rætt.

Fuglafrøðifelagið vil tí heita á Friðingarnevndina um at viðgerða øll punkt í fyrra skrivinum, og viðgerða hetta samlaða málið eftir øllum viðkomandi ásetingum í lógini.

## Náttúran við Hólman

*Aftanfyri fuglanøvn eru bókstavir sum NT og DD, hetta vísur til Reyðlistan, sum er at finna á heimasíðuni hjá Innlendismálaráðnum og Náttúrugripasavninum. (-) merkir at slagið ikki er nevnt í reyðlistanum, tí tað verður mett ikki at eiga regluliga í Føroyum.*

Fuglafrøðifelagið metir, at økið við Hólman og Vatnið er serstakliga týdningarmikið hjá fugli. Bæði hjá tí fugli, sum eigur har á leiðini og honum sum nýtir hetta staðið sum hvíliplláss á ferð síni suður- og norðeftir.
Fuglur er at síggja í Hólmanum, m.a. mýrusnípa (NT), bládúgva (NT), krikkont (DD), teymont (-) og jarðarkona (-). Møguliga hevur jarðarkona átt har, hóast hon ongantíð er staðfest at eiga í Føroyum.
Fuglafrøðifelagið veit, at serstakar plantur eru í Hólmanum, men hevur onga serfrøðinga vitan um tað og heitur á Friðingarnevndina um at leita sær kunning um hetta.
Í summar sá formaðurin (undirritaði) eitt óbúgvið skordýr í hópinum Hemiptera á gøtuni við Hólman. Einki er at ivast í, at hetta hoyrir til eina skordýraætt, sum ikki er skrásett at eiga í Føroyum áður. Hetta bendur a eitt serstakt skordýralív í Hólmanum.

Hólmin er týdningarmikil fyri fuglalívið á sjálvum Vatninum og rundan um tað eisini. Tí nógvur plantuvøkstur er í Hólmanum og harvið er nógv lívrunnið tilfar. Tílíkt ger tað liviligt hjá skordýrum og líknandi, sum í sær sjálvum hevur eitt stórt náttúruvirði, men sum eisini er ein føðikelda hjá fugli. Samanlagt merkir hetta helst, at Hólmin er týdningarmikil bæði sum beinleiðis og óbeinleiðis føðikelda hjá fugli. Við óbeinleiðis føðikeldu verður meint, at Hólmin er ein føðikelda fyri djóralív, sum er ein føðikelda hjá fugli. Umframt at síði vøksturin reint fysiskt er góður fyri fugla- og annað lív.

Á Vatninum og rundanum sæst ofta fuglur, sum ikki sæst nógv til aðrastaðni í Føroyum. Í hesum økið

sæst gjør (-), toppont (VU), villdunna (VU), krikkont (DD), ennigul ont (DD), tannont (-), grágás (VU), grábøkut ont (-), svanur (-), sjógvhøna (-), ógvella (-), teymont (-), svanur (-), súgont (-), trøllont (-), stelkur (CR), spógvi (VU), tangspógvi (CR), reyðspógvi (DD), svarthálsa (CR), vípa (CR), tjaldur (NT), tjaldursgrælingur (-), fjallmurra (CR), mýrisnípa (NT) og lítil mýrisnípa (-). Terna (EN) eigur í økinum og sæst í búðtíðuni javnan á vatninum.

Í bókini Ferðafuglur, sum Dorete Bloch og Søren Sørensen góvu út í 1988, stendur at lesa, at Eiðisvatn er eitt ógvuliga týdningarmikið stað hjá vatnfuglum, ið dvølja sum strokfuglar. Nú Eiðisvatn er tikið til vatnorku, er tað ikki so nógvur fuglur at síggja her, men Vatnið niðri við Mølina hevur møguliga tikið yvir henda leiklut. Í hvussu er bendur ríka fuglalívið á tað.

Tað hava verið fleiri misskiljingar í teimum skrivum, sum hava staðið í bløðunum, í samband við hetta málið.
Ein misskiljing er, at Hólmin er einans av týdningi fyri tað fuglalív, sum sæst í Hólmanum. Sum víst á omanfyri, so er Hólmin helst av stórum týdningi fyri fuglin sum sæst á vatninum, men eisini rundanum vatni. Ein onnur misskiljing er, at tá fólk ikki síggja fugl í Hólmanum, so er eingin fuglur har. Tað er ein sannroynd, at tey, sum ikki leggja seg beinleiðis eftir at hyggja eftir fugli í einum ávísum øki, ikki síggja alt tað sum er har. Tað er væl skiljandi, at tey sum liggja inni við hesum báðum misskiljingum, halda at Hólmin er av lítlum týdningi.
Fuglafrøðifelagið leggur dent á, at tað er okkara meting, at Hólmin er av týdningi fyri fuglalívið í økinum.

## Samlaða økið

Fuglafrøðifelagið vil eisini vísa á at náttúran á Eiði verður mett at hava eitt serstakt náttúruvirði. Í Visjón 2015 álitinum um umhvørvi, verður Eiðiskollur nevndur sum evni til Tjóðgarð. Somuleiðis nevnir bókin Føroya Náttúra (Lívfrøðiligt Margfeldi) Eiðiskoll. Har eru serliga nógvar sjáldsamar plantur, umframt brúðarvevjari - ein sjáldsamur firvaldur. Lítið er at ivast í, at tá vit hava fingið lóg og umsiting, sum kann taka sær av friðingum, so verður Kollurin gjørdur til Tjóðargarð. Fuglafrøðifelagið meinar, at eitt náttúruvakurt og týdningarmikið økið missir nógv av sínum varkurleika og týdningi, um náttúran rundan um er niðurpínd og syndarlig.
Beint eystan- og omanfyri Múlavík er serstøk máa hella. Tað var m.a. við støðið í hesari serstøku hellu, at ástøði um ístíðir varð ment.

National Geographic hevur valt Føroyar sum tað mest áhugaverda oyggjarlandið at ferðast til í heiminum - fyri tey sum eru áhugaði í øðrum enn stuttleikaferðum til Ibiza. Útlendskir serfrøðingar hava verið í Føroyum og greitt frá hvussu týdningarmikið tað er, at vit verja ta náttúru vit hava, og nýta teir møguleikar sum hon gevur í samband við Vistferðavinnu. Fuglafrøðifelagið sær hetta sum ein gyltan møguleiki at menna onnur økir enn miðstaðarøkið. Økið við Eiðis bygd er plantu-, jarð-, og fuglafrøðiliga áhugavert og hevur sera góðar fortreytir fyri at njóta gott av teimum møguleikum, sum vistferðavinna gevur. Tó, tað er ein veruligur vandi fyri, at um Hólmin hvørvur, so hvørvur tað áhugaverda fuglalívið úr økinum, og harvið ein av fortreytunum fyri at njóta gott av vistferðavinnu.

## Áheitan

Fuglafrøðifelagið vil hervið heita á Friðingarnevndina í Eysturoyar Sýslu, um ikki at geva Eiðis kommunu loyvi at fylla grót í Hólman á Eiði.

Vegna Føroya Fuglafrøðifelag
Janus Hansen, formaður
-------------------------------
Føroya Fuglafrøðifelag
ffff@kallnet.fo
www.faroenature.net/ffff

Tilvísingar:

Ferðafuglur, Føroya Lærarafelag, 1988

Reyðlisti, Føroya Náttúrugripasavn, 2005 - www.imr.fo

Føroya Náttúra, Føroya Skúlabókagrunnur, 2006

Visjón 2015, Grundarsteinur: Umhvørvi, 2007 - www.visjon2015.fo

Niðurstøða eftir ráðstevnuna hjá SamViti um vistferðavinnu - www.tourist.fo

Destinations Rated: Islands - www.nationalgeographic.com